# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Vit hava ein góðan málverja, og hann bjargaði okkum.*

*Alex McLeish, skotskur landsliðsvenjari*

# Kenni meg sum heilan føroying



*– Hetta er heilt ótrúliga stórt hjá mær, serliga havandi í huga, at eg ikki eri ordiligur føroyingur, men bara hálvur, sigur Christian Lamhauge Holst*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Vælleikandi Christian Lamhague Holst varð fagnaður av føroyskum fjepparum eftir dystin**

LANDSDYSTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

– Hetta er heilt ótrúliga stórt hjá mær, serliga havandi í huga, at eg ikki eri ordiligur føroyingur, men bara hálvur, segði sjónliga fegin Christian Lamhauge Holst, tá vit fingu hála hann til síðis beint eftir dystin.

– So í hesi løtu kenni eg meg sum heilan føroying, segði stórsmílandi danin, sum hevur røtur til Føroya.

Aftanfyri hann stóð ein riðil syngjandi áskoðarum og fagnaðu honum, ið stríddist sum fyri fleiri á fremsta sessin á liðnum. Og fyrikomandi sum Lyngby-leikarin er, fór hann út til fjøldina og takkaði henni fyri stuðulin, teir veittu honum og føroyska liðnum.

– Nú vóni eg bara, at hetta er ein viðurkenning av mínum avriki, og ikki bara til stuttleikar, at rópt verður eftir mær, helt Christian Lamhauge Holst skemtandi fyri.

## Altíð tendraður

Móti Italiu loysti Christian Lamhauge Holst Andrew av Fløtum av miðskeiðis í seinna hálvleiki, og var tað um reppið at hann skoraði. Móti skotum fekk Holst kjansin frá byrjan, og hann tók av.

– Eg eri altíð tendraður, og so royndi bara at spæla bólt og kempa alt tað, eg havi lært, sigur Christian Lamhauge Holst, sum sá út til at fáa trupulleikar við beininum, tá seinni hálvleikur var um at vera hálvrunnin.

– Eg fekk eitt spark inn yvir beini, men tá tað er stuttligt at spæla, sum tað var, so fær man eyka orku, og tí kundi eg blíva við, sigur hann smílandi.

## Uppiborið javnleik

Eftir síðsta bríksl á Svangaskarði halda nógv, at føroyska liðið hevði uppiborið meira. Christian Lamhauge Holst er eisini av somu fatan.

– Tað haldi eg eisini. Og um eg skal vera heilt erligur, so halda eg vit hava uppiborið javnleik, segði Christian Lamhauge Holst, sum væl nøgdur kann seta seg í flogfarið til Danmarkar í dag.

## Topphúgvan burturvíst

**Fyrr- og núverandi eysturríkski landsliðsvenjarin, Josef Hickersberger, segði kortanei, tá hann skuldi hava Jens Martin Knudsen á sínum liði í sonevndum All Star dysti. Og tí verður tað Dudek og ikki Knudsen, sum skal spæla saman við Laudrup, Faxe og øðrum EM-stjørnum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í kvøld klokkan 17 føroyska tíð eru akkurát 365 samdøgur, til komandi EM-endaspælið byrjar. Hetta verður hátíðarhildið fleiri staðni í báðum alputjóðunum, har stórar klokkur, sum telja niður til fyrsta kick-off bríkslið, verða settar ígongd.

Ein partur av hátíðarhaldinum er ein sonevndur All Star dystur, har tvey lið við kendum fótbóltsspælarum skuldu dystast á einum nýggjum innandura leikvølli í Interlaken í Eysturríki. Millum teirra, sum fingu innbjóðing at spæla við á liðnum eru mætir menn sum Michael Laudrup, John Faxe Jensen og so Jens Martin Knudsen. Føroyski málverjin við topphúgvuni, sum varð heimskendur á sinni, tá Føroyar vunnu 1-0 á Eysturríki í minniliga dystinum í Landskrona í 1990.

### Sleppur til EM

Júst tann dysturin varð tó eisini orsøk til, at Jens Martin ongan veg slapp, tá alt skuldi gerast upp. Venjari hjá Eysturríki ta ferðina var Josef Hickersberger, sum eftir svartasta dagin í eysturríkskari fótbóltssøgu fekk sekkin. Hann er tó aftur í dag landsliðsvenjari hjá Eysturríki, og tí skuldi hann saman við sveisiska landsliðsvenjaranum standa á odda fyri liðunum, sum skuldi spæla í Interlaken.

Og tá hann hoyrdi, at føroyska topphúgvan skuldi spæla við, segði hann bums nei. Ikki talingur um, at svartasti dagur hansara enn eina ferð skuldi rullast fram fyri almenninginum. Og tí fekk Jens Martin týsdagin at vita, at hann kortini ikki slapp upp í part í dystinum.

- Tað er nú ikki nakað, sum eg taki so øgiliga tungt. Tað vildi sjálvandi verið stuttligt at spælt ein dyst við hasum liðnum. Og ivaleyst kundi hetta enn eina ferð verið við til at sett Føroyar á altjóða fótbóltskortið. Men eg kann so bara staðfesta, at soleiðis skuldi ikki verða, sigur Jens Martin Knudsen.

Ístaðin hava hann og konan fingið gestainnbjóðing til EM-endaspælið, men enn hevði málverjin so ikki tikið støðu til, hvørt tikið verður av hesum.

Ístaðin fyri Jens Martin er Liverpool-málverjin, Jerzty Dudek, tikin út til liðið.



*Josef Hickersberger hevur als ikki gloymt tann 12. september í 1990. Ein dagur, sum uttan iva er tann svartasti í fótbóltssøguni hjá Eysturríki*